# valdystum



Aftan á eitt sera hart valstríð í 1860 vann Abraham Lincoln forsetavalið




Richard Nixon stóð í 1972 á odda fyri tí helst skitnasta valstríðnum í nýggjari tíð, tá hann vann á demokratinum, George McGovern

in varð, at Hægsti Rættur mátti fella dóm um valúrslitið. Við einari atkvøðu í meiriluta staðfestu hægsturættardómarnir, at Rutherford Hayes hevði vunnið forsetavalið.

## 1920:
### Kvinnur, tubakk og rúsdrekka

Repuplikanska forsetavalevnið í 1920, Warren Harding tykist at verða eitt lætt offur hjá demokratunum. Hann hevði tvær frillur, eitt barn uttanfyri hjúnarlagið, hann drakk, roykti og spældi poker. Av tí sama vistu Harding og fólkini í hansara legu, at tey skuldu ikki leypa á moralin hjá demokratiska mótstøðumanninum, James Cox. Tann joviali og sjarmerandi Harding førdi eitt nýmótans valstríð við slagorðum, sum "Aftur til tað vanliga" og "USA fyrst!". Hetta fór beint inn hjá amerikanska almenninginum, sum tá í tíðini ikki høvdu hug at blanda seg uppí trupuleikarnar kring Heimin. Harding varð eisini væl við fleiri filmsstjørnur í Hollywood, og tað gjørdi hann bara enn betur umtóktan millum veljarnar.

James Cox, og mennirnir í hansara legu royndu at skaða Harding við at nevna hann ein býttling, eina marionetdukku, og ein drykkiglaðan 2. flokspolitikkara, sum hevði skrumpulivur. Ein suðurstats-professari fór so langt, at hann tvíhelt, at Harding hevði nekarablóð í æðrunum. Ein amerikanskur journalistur konfronteraði Harding við hesum. Harding svaraði bara heilt einfalt – Hvussu kann eg vita tað? Tað er væl møguligt, at ein av mínum forfedrum hevur hoppað upp um garðin. Sjarman og hittinorðini gjørdu, at Warren Harding vann forsetavalið í 1920.

## 1928:
### Kálstinkandi írar

Í 1928 vóru øll tekin í sól og mána, at USA fór at fáa sín fyrsta katólska forseta. Valevnið hjá demokratinum, Al Smith varð bæði sjarmerandi, fólksligur, og áðrenn valstríðið fór í gongd, væl dámdur millum manna. Mótstøðumaðurin, repuplikkanarin, Herbert Hoover varð hinvegin bæði keðiligur og turrisligur. Al Smith hevði so ruddiliga vunnið á Herbert Hoover, um tað ikki hevði verið fyri tveir lutir. Al Smith varð katolikkur, og hann varð av írskari ætt. Repuplikkanarnir koyrdu eitt skitið valstríð, sum boðaði frá, at Al Smith hevði svorið yvirfyri pávanum í Róm, at hann vildi gera alt USA katólskt. Repuplikkanarnir fingu protestantiskar prestar við sær, sum lupu ræðslu á miljónir av protestantum, við at fortelja teimum, at Smith fór at seta øll protestantisk hjúnabond úr gildi. Øll protestantisk børn fóru at verða óektaði børn, og tað fór at verða bannað at lesa Bíbliuna, um Smith gjørdist forseti. Tá Smith fór vestureftir at føra valstríð, varð hann møttur av brennandi krossum, og í einum føri var nær við, at tokvognurin hjá honum varð sprongdur í luftina. Konan, Kate Smith var eisini spottað niður og norður. Repuplikanarnir skrivaðu, at Kate Smith fór at ganga full og vála í Hvítu Húsunum. Washington fór at stinka av káli, og Kate Smith fór at gera USA fyri skommum yvirfyri útlendsku sendimonnunum. Meirilutin av veljarunum valdu at trúgva repuplikanarunum, og ikki fyrr enn í 1961 gjørdist ein katolikkur forseti í USA.

## 1972:
### Innbrot og følsk lesarabrøv

Í 1972 vildi táverandi repuplikkanski forsetin, Richard Nixon gera alt fyri at varðveita valdið. Hann fór so langt, at hansara fólk sendu fleiri lesarabrøv til tey amerikonsku bløðini við fiktivum nøvnum, sum stuðlaðu krígnum í Vietnam. Nixon fekk eisini tveir fyrrverandi CIA-agentar at bróta inn í høvuðsskrivstovuna hjá demokratunum í Watergate, fyri at seta lurtiútgerð upp í skrivstovunum. Samstundis førdi Nixon eitt grovt valstríð ímóti demokratinum, George McGovern. Nixon ákærdi McCovern fyri at verða ein radikalan aktivist, sum vildi forera allan Heimin til kommunistarnar. Haraftrat tvíhelt Nixon, at McGovern gekk inn fyri fríari fosturtøku, og at fólk skuldu hava fría og ótálmaða atgongd til rúsevni, so sum LSD. George McGovern kom ongantíð fyri seg i valstríðnum, og tapti stórt til Nixon. Tvey ár seinni kundi McGovern tó síggja Nixon verða riknan frá valdinum, tá Washington Post hevði avdúkað alla ta ólógligu óhumskina hjá Richard Nixon.

Valstríðið millum Barrack Obama og John McCain er lítið skitið samanborið við tey valstríð vit hava nevnt omanfyri.